umhvørvisstovan

Vegleiðing 16/2016

# Vegleiðing um góðkenning og umhvørvisárinsmeting av verkætlanum á sjónum og í sjóvarmálanum

**Henda vegleiðing er ætlað kommunum, feløgum o.ø., sum ætla undir verkætlanir í sjóvarmálanum og nakað út frá landi.**

Verkætlanir og virksemi á sjónum og fram við strondini, ið ávirka náttúru og umhvørvi munandi, kunnu ikki setast í verk uttan góðkenning frá Umhvørvisstovuni. Slík góðkenning skal vera grundað á eina meting av avleiðingum fyri náttúru og umhvørvi[1].

Dømi um verkætlanir, sum skulu góðkennast eru havnargerð, dýping, sandgrevstur, legging av kaðali, orkuverk á sjónum ella í sjóvarmálanum.

Kommuna ella felag skal altíð og í  góðari tíð seta seg í samband við Umhvørvisstovuna fyri at greiða frá verkætlanini. Fyri smærri verkætlanir í minsta lagi seks mánaðir, áðrenn arbeiðið eftir ætlan skal byrja. Fyri størri verkætlanir krevst ofta longri tíð.

Tað hevur týdning, at verkætlanin ikki á nakran hátt er byrjað ella sett í verk innan Umhvørvisstovan hevur tikið støðu til málið.

## Umhvørvisárinsmeting og góðkenning

Umhvørvisstovan metir um einstøku verkætlanirnar og tekur síðani avgerð um, hvørjar verkætlanir ikki kunnu fremjast uttan góðkenning. Umhvørvisstovan setir eisini krøv til innihaldið í umhvørvisárinsmetingum, sum skulu gerast í sambandi við góðkenningar.

Endamálið við árinsmetingini er at tryggja, at mett verður um verkætlanir á sjónum ella í sjóvarmálanum, sum  kunnu hava munandi árin á náttúru og umhvørvi, og at møgulig árin í størst møguligan mun verða fyribyrgd ella avmarkað. Metingin verður gjørd í tveimum stigum.

### Stutt lýsing av verkætlanini

Fyri at Umhvørvisstovan skal kunna meta um, hvørt tað er neyðugt við góðkenning av verkætlan, skal kommuna ella felag lata Umhvørvisstovuni eina lýsing av henni, sum í minsta lagi fevnir um:

- staðseting, dýpi og víddir av fjøru og botni, sum verða ávirkað, umframt tekningar ella myndir
- stutt lívfrøðilig lýsing av plantum, djórum og umhvørvinum í økinum niðanfyri sjóvarmálan og nakað útum ætlaðu útfyllingina
- slag av virksemi, ætlanin er at hava á økinum
- tíðarætlan

[1] Løgtingslóg nr. 59 frá 17. mai 2005 um verju av havumhvørvinum, Kapittul 13

Umhvørvisstovan· Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01· us@us.fo · www.us.fo

Við støði í hesi lýsingini tekur Umhvørvisstovan endaliga støðu til, um verkætlanin skal hava góðkenning og harvið um gjøllig umhvørvisárinsmeting skal gerast, ella um verkætlanin kann fremjast uttan góðkenning.

**Umhvørvisárinsmeting av verkætlanini**

Ein umhvørvisárinsmeting, sum er ein meira víðfevnd lýsing av náttúru og umhvørvi og hvørji árin ætlaða virksemið kann hava á hesi, skal í minsta lagi fevna um hesi evni ella viðurskifti:

1. Frágreiðing um ætlanina, so sum
   - staðseting, botn- og fjørulýsing og økisvídd
   - tíðarætlan fyri verkætlanina, bæði bygging og rakstur
   - slag av virksemi, heruppi í framleiðsla, rávørunýtsla o.a.
   - annað virksemi í økinum, sum kann ávirka náttúru og umhvørvi
   - útlát so sum spillivatn, roykur, óljóð, ristingar, ljós, geisling o.a., bæði í sambandi við bygging og rakstur.

2. Grundgeving fyri vali av staði og yvirlit yvir onnur støð, sum hava verið umrødd.

3. Lýsing av náttúru og umhvørvi á staðnum og ta ávirkan, ætlanin kann hava á eitt nú:
   - jørð, vatn, sjógv og luft
   - plantu- og djóralív á landi, í luftini, í sjónum, á havbotninum og í sjóvarmálanum
   - fólk og bústaðarøki
   - rekreativ virði, landsløg o.a.

4. Hvørji tiltøk ætlandi verða sett í verk fyri at avmarka møguliga ávirkan á náttúru og umhvørvi.

Alt viðkomandi tilfar um verkætlanina verður skrivað saman í eina umhvørvisárinsmeting og latið Umhvørvisstovuni.

**Hoyring av umhvørvisárinsmetingini**

Tá Umhvørvisstovan metir, at umhvørvisárinsmetingin inniheldur neyðugu upplýsingarnar, verður frágreiðingin send í almenna hoyring. Hoyringsfreistin er vanliga 6 vikur.

Tá hoyringsfreistin er farin, viðgerð Umhvørvisstovan svarini og tekur endaliga avgerð um, hvørt verkætlanin verður góðkend ella ikki. Treytir kunnu verða settar í góðkenningini.

Góðkenningin verður lýst á heimasíðu stovnsins og minst einum tíðindablaði. Avgerðin kann kærast til viðkomandi landsstýrisfólk innan fýra vikur.

Fyrstuferð útgivin: 12-01-2016
Útgáva nr. 2 14-02-2018